# *Bygdaráðsfundur*

**<u>Bygdaráðsfundur 31.05.2021 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Sigurd Justinussen, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 74/2021 Viðgerð av innihaldinum í Umhvørvisnevndini | ALMENT |
| Mál nr. 75/2021 Nes kommuna – Fíggjarætlan 2021 | ALMENT |
| Mál nr. 76/2021 Ársfrásøgn og protokol hjá Kongshavnar Havn | ALMENT |
| Mál nr. 77/2021 Umsókn um stuðul til konsert í Fríðrikskirkjuni | ALMENT |
| Mál nr. 78/2021 Keyp av hjartastartarum | ALMENT |
| Mál nr. 79/2021 Umsókn um byggiloyvi til vinnubygning | ALMENT |
| Mál nr. 80/2021 Umsókn um øki til sethús | ALMENT |
| Mál nr. 81/2021 Umsókn um grundstykki á Toftum | ALMENT |
| Mál nr. 82/2021 Ferðsluforðingar á Rókavegnum | ALMENT |
| Mál nr. 83/2021 Áheitan um vegbungir á Hjallavegi | ALMENT |
| Mál nr. 84/2021 Bátahylurin / Oyrarnar – Hugskotskapping | ALMENT |
| Mál nr. 85/2021 Liðugtgerð av uttanumøkinum hjá Sandship | ALMENT |
| Mál nr. 86/2021 Gelendari á gøtuna niðan á Hamar | ALMENT |
| Mál nr. 87/2021 Ársroknskapur hjá Nes kommunu 2020 | ALMENT |

**<u>Mál nr. 74/2021 Viðgerð av innihaldinum í Umhvørvisnevndini 2. viðgerð ALMENT</u>**
<u>J. nr. 22002-1-2021</u>

Fyrsta málið hjá Umhvørvisnevndini verður at allýsa innihaldið, og hvørji mál nevndin skal seta sær.

> **Á fundi 12.01.2021 mælir Umhvørvisnevndin til at viðgera, hvørjar broytingar kunnu gerast í kommunustýrisskipanini fyri Nes kommunu, soleiðis at innihaldið í nevndini verður greitt og kann leiða til góð úrslit innan umhvørvisøki.**

Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini er viðfest, har Umhvørvisnevndin hevur fingið lýst, hvørji ábyrgdarøki eru viðkomandi fyri nevndina.

**Á fundi 09.02.2021 mælir Umhvørvisnevndin til at broyta heitið á nevndini til Burðardygd og arbeiða víðari við uppskotinum um broyting av kommunustýrisskipanini í mun til Umhvørvisnevndina.**

Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini er viðfest, har nevndin Burðardygd hevur fingið ítøkilig árbyrgdarøki at umsita.

**Á fundi 09.03.2021 mælir nevndin Burðardygd til at taka undir við broytingini av kommunustýrisskipanini.**

**Tilmælið hjá nevndini Burðardygd varð á bygdaráðsfundi 26.04.2021 einmælt samtykt.**

**Tilmælið hjá nevndini Burðardygd varð á bygdaráðsfundi 31.05.2021 einmælt samtykt undir 2. viðgerð.**

**Mál nr. 75/2021 Nes kommuna – Fíggjarætlan 2021 ALMENT**
J.nr. 1107-5-2021

Viðvíkjandi at flyta játtan til íløgur frá 2020 til 2021 og eykajáttanir.

Bygdaráðið hevur gjøgnumgingið íløgurnar, ið vórðu játtaðar í 2020, men sum ikki blivu nýttar, tí arbeiðið bleiv seinkað, og mælir til, at hesin peningur verður fluttur til 2021, og at hesar eykajáttanir verða gjørdar:

**Flutt frá undanfarna árið**

| | |
|---|---|
| §2 Ellis og Røktarheim | 732.000 |
| §3 Barnagarður | 243.000 |
| §3 Frítíðarskúlin | 3.783.000 |
| §5 Svangaskarð girðing | 378.000 |
| §6 Byggibúning | 827.000 |
| §6 Reinsiverkið pumpuskipan | 526.000 |
| §6 Spillvatnsætlan | 100.000 |
| §6 Autoverja | 200.000 |
| §6 Veg íløga | 195.000 |
| §7 Havnin | 500.000 |

| | |
|---|---|
| **Í alt** | **7.484.000** |

**Játta eyka íløgur**

| | |
|---|---|
| §3 Barnagarður | 140.000 |
| §3 Frítíðarskúlin | 1.025.000 |
| §4 Tofta skúli | 750.000 |
| §5 Svangaskarð | 100.000 |
| §6 Byggibúning | 3.995.000 |
| §6 vegir | 445.000 |
| §6 Rakstrargøgn | 80.000 |
| §7 Havnin | -700.000 |
| **Í alt** | **5.835.000** |

**Játta eyka rakstur**

| | |
|---|---|
| §3 Barnagarður | 30.000 |
| §3 Ábøtur á stovnar | 100.000 |
| §4 Tofta skúli | 177.000 |
| §5 Svangaskarð | 200.000 |
| **Í alt** | **507.000** |

Bygdaráðið mælir sostatt til, at kr. 7.484.000 verða fluttar frá undanfarna árið, kr. 5.835.000 verða játtaðar eyka til íløgur og kr. 507.000 játtaðar eyka til rakstur í alt kr. 13.826.000.

**Á fundi 20.04.2021 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við omanfyristandandi og mælir til at kr. 11.000,000 verður fíggjað við lántøku, sum kommunan hevur tikið í 2019, men ikki gjørt brúk av, og at kr. 2.826,000 verður fíggjað við tøkum peningi.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð á bygdaráðsfundi 26.04.2021 einmælt samtykt.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð á bygdaráðsfundi 31.05.2021 einmælt samtykt undir 2. viðgerð.**

**Mál nr. 76/2021 Kongshavnar Havn – Rakstraræltan og roknskapur 2020 ALMENT**

J.nr. 814002-1-2020

Roknskapurin fyri 2020 hjá Kongshavnar havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

| | **Ætlan 2020** | **Roknskapur 2020** | **2019** |
|---|---|---|---|
| Havnagjøld | 1.739.000 | 1.678.434 | 1.481.577 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur brutto** | **1.739.000** | **1.678.434** | **1.481.577** |
| Uppkrevjingarkostnaður | -434.750 | -419.609 | -370.394 |
| **Inntøkur netto** | **1.304.250** | **1.258.826** | **1.111.183** |
| Fyrisitingin | -80.260 | -82.777 | -77.882 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | -1.900 | -1.871 | -1.878 |
| Marknaðarføring | -90.000 | 0 | -90.000 |
| Umhvørvi (Ljóðdálking) | -25.000 | 0 | -150.000 |
| Fishing for Litter | -20.000 | 0 | 0 |
| Rudding | -70.000 | - 70.000 | -70.000 |
| | **-287.160** | **-154.648** | **-389.760** |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **1.017.090** | **1.204.178** | **721.423** |
| Rentuinntøkur og tílíkt | 0 | 0 | 0 |
| Rentuútreiðslur | -1.000 | -14.398 | -1.575 |
| **Rentur í alt** | **-1.000** | **-14.398** | **-1.575** |
| **Ársins úrslit** | **1.016.090** | **1.189.780** | **719.848** |

**Á fundi 25.05.2021 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum hjá Kongshavnar Havn fyri 2020, soleiðis sum hann er uppsettur.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 77/2021 Umsókn um stuðul til konsert í Fríðrikskirkjuni ALMENT**

J.nr. 2201-3-2021

Í teldubrævið móttikið 07.04.2021 søkir Arina Bischoff um stuðul til framførslur av Händels Dixit Dominus á Hvítusunnu 2021.

Hesa konsertina hevur Bernharður Wilkinson, ið er kórleiðari hjá Tórshavnar Kamarkóri, leingi havt eitt ynski um. Venjingar eru farnar í gongd, og eru framførðslur settar á skrá í Fríðrikskirkjuni og í Vesturkirkjuni á hvítusunnu.

Um 80 fólk verða við í framførslunum sum umframt kórsangarar, umfatar solistar og áleið 20 tónleikarar. Solistar verða ungu songkvinnurnar Sanna Hoydal Bæk og Marit Iversen, sum kemur heim úr Noregi.

**Á fundi 18.05.2021 mælir Mentanarnevndin til at játta kr. 3.000 til konsertina.**

**Tilmælið hjá Mentanarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 78/2021 Keyp av hjartastartarum ALMENT**
J. nr. 1101-2-2021

Eftir áheitan er tilboð komið frá Ansni og Fønix uppá 3 stk hjartastarar.

Tilboðini eru viðheft.

Ansni hevur lægra tilboðið á kr 43.400 + mvg

**Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska nevnd til at umsitingin fer undir samráðingar við Ansni um betri prís og keypa 3 skáp.**

**Á fundi 25.05.2021 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og at peningurin fer av stovninum Aðrar kommunalar útreiðslur.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 79/2020 Umsókn um byggiloyvi til vinnubygning ALMENT**
J. nr. 803252-3-2020

Eftir einari tilgongd um ætlanir at byggja ein vinnubygning á havnalagnum, móttekur Nes kommuna tann 8 oktober 2020 eina umsókn um byggiloyvi. Umsóknin er frá stjóranum í felagnum GC Rieber Føroyar, Jóhannus M. Olsen, og tekningarnar v.m. eru gjørdar av Teknistovuni í Gøtu.

Í hesi tilgongdini hava verið fleiri uppskot um vídd, hædd, og skap verið frammi. Síðani hevur umsøkjarin ( eftir áheitan frá byggivaldinum ), roynt at tillaga ein bygning eftir verandi umstøðum á staðnum.

Bygningin verður í høvusheitum nýttur sum saltgoymsla og tað avleidda virksemi sum er av slíkari vinnu.

Sum sagt: Bygningurin nú nakað minni enn upprunaliga støddin, so at frástøðan til grannabygningar nú verður størri enn fyrsta uppskoti. Eisini vendir tekjan sama veg sum grannabygningarnir, eystur og vestur.

Sambært umsóknini er bygningurin tils. 47 x 35,60 metrar. Herav ein lægri tilbygningur á 11,40 x alla breiddina
Hæddin er 10 metrar upp undir loftið innan. T.v.s. samlaða hæddin verður áleið 11 metrar.

**Á fundi 16.10.2020 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi sambært nýggju umsóknina. Tó skal ásetingin um mest loyvdu hædd á 10 m haldast.**

**Eisini mælir nevndin til at fasadan fær eina dámliga klæðing.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

28.10.2020 varð byggiloyvi latið til vinnubygning á matr. nr. 435i á havnalagnum.

Umsøkjarin er í vár komin við ynski um at seta upp eina fyribilshøll. Umsøkjarin hevur ein akuttan trupulleika við ongari høll, soleiðis at hann kann levera salt til sínar kundar.

Fyribilshøllin er ein stálkonstruktión og er klødd við PVC dúki. Veitingartíðin til eina slíka høll er 6 vikur, og dekkar akutta tørvin. Fyribilshøllin verður tikin niðuraftur, tá vinnubygningurin, sum loyvi er givið til, er liðugt bygdur.

**Á fundi 14.04.2021 mælir Tekniska frá at geva loyvi til fyribilshøllina.**

Jóhannus M. Olsen legði nærri frágreiðing fram um ætlanina fyri bygdaráðnum tann 26.04.2021.

**Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska framhaldandi at halda fast í tilmælið frá 14.04.2021.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 80/2021 Umsókn um øki til sethús ALMENT</u>**
<u>J.nr. 1201-3-2021</u>

Byggivirkið KBH arbeiðir við ætlanum um bygging av ymiskum sethúsum.

Teir hava nakrar húsatypir, sum tó møguliga skullu tillagast ítøkiliga byggiøkinum. Tískil bera teir fram fyrispurningin, um Nes Kommuna hevur 3 til 5 grundstykkir tøk - antin á verandi útstykkingum, ella møguliga onnur egnaði øki í kommununi, sum kundi hóska seg til slíka bygging.

KBH sigur seg fáa nógvar fyrispurningar um nýggj sethús, men síggja ofta, at ætlanin at byggja ikki røkkur á mál. Tað kunnu vera ymiskar orsøkir til tað. Hetta sæst eisini aftur á teimun ymisku útstykkingunum sum verða gjørdar. Teir siga harafturat, at tað vísir seg ofta at taka langa tíð, áðrenn verulig gongd kemur á nakra munandi bygging, sjálvt um tørvurin á búðstaðareindum er ovurstórur.

KBH sær at tørvur eisini er á at keypa eina lidna loysn, heldur enn at fólk fara ígongd við at byggja sjálvi.

Um stykkir eru tøk, kunnu teir skjótt vera klárir og fara ígongd at byggja. Hetta kann, sambært KBH, bæði vera við til at draga fólk til økið, og harumframt seta ferð á bygging í Nes kommunu.

Umsitingin hevur funnið 4 møgulig øki, har sethús kunnu byggjast.

> **Á fundi 14.04.2021 mælir Tekniska nevnd til at umsøkjarin verður kallaður inn til fund um økini, sum Tekniska deild hevur sum uppskot.**

Helgi Johannesen var á fundi 05.05.2021, og fekk innlit í stykkini, sum umsitingin hevði at vísa fram. Helgi vendi aftur og vísti á, at mest áhugi var fyri stykkinum á Agninum.

Teir siga seg longu hava uppskot til, hvussu teir fáa 3 stk. hús á økið at vísa á, so skjótt teir hava tilsøgn og greiðar treytir at arbeiða víðari út frá.

> **Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska nevnd til at Nes kommuna ognar sær lendið á Agninum sambært skjøl. KBH veitir Nes kommunu neyvar tekningar til at taka endaliga støðu út frá í samband við byggiloyvið. Harafturat verður mælt til, at íbindingargjaldið verður sum vanligt eftir galdandi reglum.**
>
> **Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 81/2021 Umsókn um grundstykki á Toftum – Niklas Poulsen ALMENT**
J. nr. 234022-33-2016

Umsókn er komin frá Niklas Poulsen og Adelheid Reginsdóttir Poulsen um sundurbýti til grundstykkið matr. nr. 342a á Toftum, ið liggur ímillum hjá Annu Kathrinu Jensen og Hans Andreas Poulsen.

**Á fundi 13.01.2021 mælir Tekniska nevnd til at samskifta við umsøkjaran um møguleikan at sundurbýta til tvey grundstykki.**

Umsøkjarin ynskir ikki at sundurbýta í tvey grundstykki, men ynskir at byggja eftir tekningum. Tekningarnar eru vegleiðandi og ikki heilt ítøkiligar. Grundstykkið er uml. 1.200 fermetrar.

Umsøkjarin ynskir eina nóg stóra grund, so akførini ikki skulu uppihaldast á kommunalum øki. Ynskið er eisini at sleppa at byggja eini størri hús enn vanligt við einari nóg stórari garasju/seyðhús.

**Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska nevnd til at loyva sundurbýtið sambært umsókn og samskifti við Teknisku deild.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

## <u>Mál nr. 82/2021 Ferðsluforðingar á Rókavegnum ALMENT</u>

<u>J. nr. 1302-1-2021</u>

Ein ferðsluforðing er við húsið hjá Høgna Petersen, og ein er innanfyri húsini hjá Martin Skoradal. Ímillum hesu økini er eingin ferðsluforðing.

Íbúgvararnir í økinum gera áhaldandi vart við, at her mugu fleiri forðingar setast upp.

**Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska nevnd til at seta upp 3 ferðsluforðingar afturat í økinum, sambært avtalu við Teknisku deild.**

**Á fundi 25.05.2021 mælir Fíggjarnevndini til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og at peningurin fer av stovninum Vegir/Ferðsluforðingar.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

## <u>Mál nr. 83/2020 Áheitan um vegbungir á Hjallavegi ALMENT</u>

<u>J.nr. 513012-1-2020</u>

Ein royndarferðsluforðing hevur verið nú í nakrar mánaðir. Støða skal takast til, hvør varandi loysn skal setast í verk.

Nakrir íbúgvar í økinum hava gjørt vart við, at ein ferðsluforðing er ikki nóg mikið.

**Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska nevnd til at seta 2 ferðsluforðingar afturat í økinum, sambært avtalu við Teknisku deild.**

**Á fundi 25.05.2021 mælir Fíggjarnevndini til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og at peningurin fer av stovninum Vegir/Ferðsluforðingar.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 84/2021 Bátahylurin / Oyrarnar – Hugskotskapping ALMENT**

J. nr. 803002-2-2020

Tilgongdin at skipa bátahylin hevur verið í viðgerð eina tíð. Ein hugskotskapping er gjørd, har feløgini: Selmar Nielsen arkitekt, Fuglø Arkitektar og Formo á Glyvrum komu við uppskotum at skipa bátahylin.

Við støði í hugskotskanningum, var tann seinna kyrrukanningin gjørd av Danish Hydraulic Institute (DHI).

Í nýggjastu kanningini viðgjørdi Danish Hydraulic Institute (DHI) hvør av simuleringunum av útbygging var tann betra – annahvørt innsigling vestan ella norðan. Niðurstøðan hjá DHI er tann, at Uppskot 2, sum er innsigling norðan, er tað kyrrasta. Sí fylgiskjal *Uppskot 1 og 2 um bestu innsigling til bátahylin_DHI.*

- *Uppskot 1 er innsigling vestan*
- *Uppskot 2 er innsigling norðan*

Uppskot 1 hevur avmarkaðar minkingar av órógvi í sjónum, eini 20%. Fleiri møguligar alternativ vóru við Uppskoti 1, men einki vísti seg at fremja stórvegis bata.

Uppskot 2 hevur haraftur ímóti við sær eina minking av órógvi í sjónum á meir enn 50%. Uppskotið tænti seg betri í øllum viðurskiftum, sum vórðu kannaði.

Við atliti at niðurstøðuni í kyrrukanningini, skal Tekniska nevnd umrøða, hvussu arbeiðast skal víðari við málinum.

**Á fundi 13.01.2021 mælir Tekniska nevnd til at hava kunningarfund 27. januar við Landsbyggifelagið og ráðgeva frá Terra.**

Síðani kunningarfundin 27. januar, hava LBF og Terra í samskifti og á fundum við Nes kommunu, víst á nøgdarmetingar av gróti og møguligan kostnað at leingja pierin.

Tey trý uppskotini, sum komu inn um skipan av økinum við Oyrarnar, skulu nú viðgerast við atliti at pierinum. Støða skal takast til, hvønn Nes kommuna velur at ráðføra seg við framyvir.

Ein fyritreyt fyri, at farast kann í gongd við at fremja partar av hugskotunum, er, at pierurin verður longdur, og at innsiglingin verður norðaneftir.

**Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska nevnd til, at Nes kommuna ráðførir seg við Fuglark framyvir viðvíkjandi skipan av økinum í Oyrunum. Harafturat mælir Tekniska nevnd til, at Nes kommuna eisini framyvir brúkar Landsbyggifelagið og David R. Hansen í sambandi við grótverjuna.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 85/2021 Liðugtgerð av uttanumøkinum hjá Sandship ALMENT**

J. nr. 1502-4-2021

Nes kommuna og Sandship vóru á fundi 12.05.2021.

Prátað varð um planering og asfaltering rundan um nýggja útbygningin (goymsluna). Sandship greiddu frá, at høllin er um at verða liðug, og vóna at gera brúk av henni beinanvegin.

Tá ið kostnaðarmeting fyriliggur, verður málið lagt fyri Teknisku nevnd og Fíggjarnevndina.

**Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska nevnd til, at arbeiðið verður gjørt, og at Tekniska deild samskiftir við fyritøkurnar Falkon og JHR um at planera og flyta**

**stórt grót sambært gjørdari kostnaðarmeting. Tekniska deild biður um tilboð uppá asfaltarbeiðið.**

**Á fundi 25.05.2021 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd. Mælt verður til, at flyta játtanina frá Moldgoymslan/Íløga á kr. 365.000, kr. 140.000 við inntøkum frá Kongshavnar havn, og írestandi kr. 400.000 verður fíggjað við tøkum peningi.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 86/2021 Gelendari á gøtuna niðan á Hamar ALMENT**
J. nr. 1206-1-2021

Ynski er komið um at seta upp gelendara upp við gøtuna frá skúlanum og niðan á Hamar.

Talan er um 80 m.

Tekniska nevnd metir, at hetta kann gerast væl og rímiliga bíliga. Hetta merkir, at settir verða upp 40 stk. pelar úr galvaniseraðum jarni. Hesir verða stoyptir fastir. So verdur ein timburlisti og hondlisti settur í erva.

Mettur kostnaður:
Tilfar: kr. 4000,-
Arbeiðsløn: kr. 20.000,-

Ìalt: kr. 24.000,-

**Á fundi 19.05.2021 mælir Tekniska nevnd til at arbeiðið verður gjørt eftir ávísing frá Teknisku deild.**

**Á fundi 25.05.2021 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum Gøtur.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 87/2021 Ársroknskapur hjá Nes kommunu 2020 ALMENT**
J. nr. 1107-7-2021

# *Bygdaráðsfundur*

Roknskapurin hjá Nes kommunu fyri 2020 er komin til ummælis.

**Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2020**

| | **Játtan** | | | **Roknskapur** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Rakstur og útlán** | | | **Rakstur og útlán** | | |
| Túsund kr. | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **4.240** | **0** | **-** | **3.962** | **0** | **0** |
| 11. Felagsútreiðslur | 4.240 | - | - | 3.962 | - | - |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **18.319** | **0** | **1.489** | **18.227** | **0** | **745** |
| 20. Heilsumál | 1.524 | - | 64 | 1.560 | - | 53 |
| 21. Almannamál | 16.795 | - | 1.425 | 16.667 | - | 693 |
| **§ 3. Børn og ung** | **12.438** | **-** | **10.892** | **12.321** | **-** | **6.866** |
| 24. Mentan | 370 | - | - | 370 | - | - |
| 26. Barnaansing | 12.068 | - | 10.892 | 11.951 | - | 6.866 |
| **§ 4. Undirvísing** | **4.125** | **-** | **750** | **4.091** | **-** | **69** |
| 23. Útbúgving og gransking | 4.125 | - | 750 | 4.091 | - | 69 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **3.602** | **0** | **2.618** | **3.261** | **10** | **2.136** |
| 23. Útbúgving og gransking | 434 | - | - | 417 | - | - |
| 24. Mentan | 3.168 | - | 2.618 | 2.844 | 10 | 2.136 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **4.352** | **-** | **7.684** | **3.701** | **-** | **6.468** |
| 11. Felagsútreiðslur | 847 | - | - | 725 | - | - |
| 22. Íbúðarmál | - | - | 4.459 | - | - | 4.265 |
| 24. Mentan | 258 | - | - | 239 | - | - |
| 30. Umhvørvi | 1.111 | - | 1.525 | 1.015 | - | 898 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 2.136 | - | 1.700 | 1.721 | - | 1.305 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **4.304** | **-** | **3.013** | **4.070** | **-** | **888** |
| 30. Umhvørvi | 3.200 | - | - | 3.109 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 404 | - | 103 | 404 | - | 103 |
| 32. Ráevnisvinna | 215 | - | 60 | 220 | - | 45 |
| 37. Handil og vinna annars | 642 | - | - | 642 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | -157 | - | 2.850 | -304 | - | 740 |
| **Tilsamans** | **51.380** | **0** | **26.446** | **49.633** | **10** | **17.171** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 841 | - | - | 865 | - | - |
| § 20. 35. Sjóvinna | 0 | - | - | - | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 521 | - | - | 491 | - | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | - | 61.746 | - | - | 66.400 | - |
| Tilsamans | 52.742 | 61.746 | 26.446 | 50.989 | 66.409 | 17.171 |
| Yvirskot | - | 9.004 | - | - | 15.421 | - |
| | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | **-** | **-17.442** | **-** | **-** | **-1.751** | **-** |
| § 25. 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | 0 | 6.665 | - | -1.030 | -371 | - |
| **Nettokassaúrslit** | **-** | **-10.777** | **-10.777** | **-1.030** | **-2.122** | **-1.092** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 3.223 | - | - | 2.910 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **3.223** | **-10.777** | **-14.000** | **1.880** | **-2.122** | **-4.002** |
| Fígging: | | | | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 14.000 | - | - | 4.002 | - |
| Fígging íalt: | - | 14.000 | 14.000 | - | 4.002 | 4.002 |
| **Samanlagt** | **3.223** | **3.223** | **-** | **1.880** | **1.880** | **-** |

| **Ogn** | **2019** | **2020** |
|---|---|---|
| **Goymslur og áogn** | **6.957** | **7.121** |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 631 | 261 |
| Skatta-, toll- o.t. skuldarar | 361 | 375 |
| Skuld hjá stovnum og myndugleikum | 5.864 | 6.447 |
| Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 101 | 48 |
| **Virðisbrøv og tøkur peningur** | **3.012** | **1.808** |
| Banka- og girokontur | 3.001 | 1.793 |
| Kassakontur | 11 | 14 |

| | | |
|---|---|---|
| **Ogn tilsamans** | **9.969** | **8.939** |
| | | |
| **Útjavningarkonta og skuld** | **2019** | **2020** |
| **Útjavningarkonta** | **-24.868** | **-27.069** |
| Salda primo | -21.390 | -24.868 |
| Rakstrar-, løgu og útlánsúrslit | -3.478 | -1.751 |
| Javningar í saldu við ársbyrjan - Pensjónsskattur | 0 | -450 |
| **Langfreistað skuld** | **30.372** | **31.464** |
| Innanlandsskuld, vanlig lán | 30.372 | 31.464 |
| **Stuttfreistað skuld** | **4.465** | **4.544** |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | 3.021 | 3.290 |
| Skuld, avgjøld | -115 | -105 |
| Varðveitingar og trygdir | 490 | 240 |
| Onnur stuttfreistað skuld | 1.068 | 1.119 |
| **Útjavningarkonta og skuld tilsamans** | **9.969** | **8.939** |

**Grannskoðanarprotokoll frá 31. mai 2021 viðvíkjandi ársroknskapinum fyri 2020 varð eisini gjøgnumgingin.**

**Á fundi 25.05.2021 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum fyri 2020 hjá Nes Kommunu soleiðis, sum hann er uppsettur.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**